# Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir 2 farmakonomnæmingum, at byrja 6. august 2001.

Ert tú áhugað/ur at nema tær útbúgving innan apotek, kunnu vit bjóða tær eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum:

Læra at arbeiða við heilivági, framleiða heilivág, læra um hvørji evni eru í, og hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.

Læra at arbeiða saman við nógvum starvsfólki, at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambært givnum lógum.

Læra at geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeining í sambandi við útflyggjan av apotekaravørum.

Útbúgvingin tekur 3 ár, og fer fram á Tjaldurs Apoteki í Tórshavn, í samstarvi við Farmakonomskúlan í Hillerød, har næmingurin skal í skúla frá 1–4 vikur ísenn, íalt 7 ferðir í lærutíðini. Eftir 2 ár, og tá lærutíðin endar, er próvtøka á skúlanum.

Krøv til umsøkjaran: Students/HF prógv, HH ella HT.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Tjaldurs Apotek**
Postboks 3010
110 Tórshavn

áðrenn 9. juli 2001.

# Leirvíkar Skúli

Søkt verður eftir lærarum til tíðaravmarkað størv við Leirvíkar Skúla skúlaárið 2001/02.

- 1 lærari at undirvísa 26,5 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi
- 1 lærari at undirvísa 26,5 tímar um vikuna (m.a. til serligan tørv) og
- 1 lærari at undirvísa 6 tímar um vikuna

Størvini verða lønt eftir sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Meira fæst at vita um størvini frá fyrstalæraranum á tlf.: 443234 ella 286935.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 27. juni klokkan 18.00.

**Leirvíkar Skúlanevnd**
v/ Adelbert Ellingsgaard
520 Leirvík

# Last og vippustell

í góðum standi, til sølu.

Er vælegnað til asfaltkoyring.

**Sp/f Í Djúpagili**
Djúpagilsvegur 32
FO-188 Hoyvík
Tlf. 215921

# Fróðskaparsetur Føroya

Upptøkur til hægri lestur á Fróðskaparsetri Føroya

**Á Náttúruvísindadeildini**
September 2001

- Støðisútbúgving í lív-/evnafrøði – tvey ára grundútbúgving
- BS í havlívfrøði – 1 árs framhaldslestur eftir støðisútbúgving
- Stakgreinalestur, har til ber at lesa einstakar lærugreinir, sum undirvíst verður í.

**Á Søgu- og samfelagsdeildini**
September 2001
Bachelor í søgu og mentanarfrøði – trý ára grundútbúgving

**Upptøkukrøv:**
Miðnámsútbúgving ella líknandi.
Lív-/evnafrøði: B-støðið í støddfrøði, alisfrøði og evnafrøði

**Umsóknarfreist:**
- 30. juni 2001

Um tú vilt hava meiri at vita ber til at lesa um útbúgvingarnar á heimasíðu Setursins, ella við at venda sær til deildirnar.

Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni ella við at venda sær til deildirnar

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Postsmoga 272
FO - 110 Tórshavn
Tel. 31 53 02 - Fax 31 89 29
Teldupostur: setur@setur.fo
Heimasíða: www.setur.fo

Á Fróðskaparsetri Føroya eru: 155 studentar, 20 vísindafólk og 3. Ph.D studentar.

Endamál Fróðskaparsetursins er at inna gransking, geva frálæru á hægri stigi og breiða út kunnleika um vísindalig háttaløg og úrslit.

# Fuglafjarðar skúli

Søkt verður eftir lærarum til skúlaárið 2001/2002.

- 2 størv 26,5 tímar fyri lærarar í farloyvi
- 2 størv 26,5 tímar fyri lærarar, ið hava niðursett tímatal
- 1 starv 6 tímar at undirvísa í motorlæru.

Størvini, sum eru tíðaravmarkaði skúlaárið 2001/2002, verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 444087.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mikudagin 20. juni kl. 16.00.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

# Skrivstovustarv

Eitt hálvtíðarstarv sum skrivstovufólk á Landsmiðstøðini er leyst at seta til 1. september 2001. Arbeiðstíðin er seinnapart.

**Arbeiðið fevnir um**
- avgreiðslu av viðskiftafólki við skivuna og um telefon
- at læna út undirvísingarmiðlar
- røkt av Kunningarsavninum
- bókhald - ávísingar, rokningar v.m.
- ymiskt annað arbeiði á stovninum

**Vit vænta, at tú**
- hevur royndir í skrivstovuyrkinum
- hevur royndir at brúka vanligastu telduforritini
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert røkin
- hevur góð samstarvsevni og hevur lætt við at samskifta við fólk

**Vit kunnu bjóða**
- eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur regluligt samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur tætt samstarv við fyrisitingina í Mentamálastýrinum.
- menningarmøguleikar innan ávís øki innan skrivstovuarbeiði.

Talan er um $^1/_2$ starv. Starvið verður lønt sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í bólki II.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Ova Petersen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. juli 2001.

**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegi 72 * Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn

*Landsmiðstøðin er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur saman við MMS eina lærugreinráðgevaskipan, skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum, skúlastýrislimum og øðrum, ið varða av skúlanum. Á Landsmiðstøðini er miðlaverkstaður.*
*Á Landsmiðstøðini starvast, umframt stjóran, 3 skrivstovufólk og 9 lærugreinaráðgevar – tilsamans umleið $7^1/_2$ fulltíðarstarv.*

# Eykaflokksting

Tjóðveldisflokkurin hevur eykaflokksting leygardagin 16. juni kl. 10.00 í Læraraskúlahøllini í Tórshavn

Til viðgerðar verða m.a. uppskot til stevnumið.

Øll tjóðveldis áhugað eru vælkomin.

**Tjóðveldisflokkurin**



# Søkt verður eftir einum fólki til Kunningarstovuna í Skopun

Av tí at Skopunar Kommuna fer at lata upp kunningarstovu í Skopun, sum verður opin tveir mánaðir um árið, verður søkt eftir einum fólki til hetta starv.

Førleikakrøv
Vit vænta okkum, at umsøkjarin m.a. hevur:
- Góðan kunnleika í enskt
- Kunnleika til teldu á brúkarastøði

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 22. juni 2001 kl. 14.00. Starvið verður at seta skjótast til ber.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 361349 ella 222662.

**Skopunar Kommuna**

Advokatfelagið
Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
Telefontíð: $9^{30}$-$12^{00}$ og $13^{00}$-$16^{00}$

Tórmóður Djurhuus, adv. Dánjal Magnussen, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.
IngiHøjgaard, adv.

# Trøð í Porkeri til sølu

Við hesum verður trøðin matr. nr. 215, Porkeri lýst til sølu.

Trøðin er til støddar 9.575 $m^2$.

Nærri upplýsingar um ognina kunnu fáast við at venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4
100 Tórshavn
Tlf. 311260

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tanntekniakri
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

# Ársaðalfundur
## hjá P/f Krossbrekku í Gøtu

verður hildin í hølunum hjá P/f Varðanum leygardagin tann 23. juni 2001 kl. 14.00.

Dagsskrá fyri fundin:
8. Val av fundarstjóra
9. Nevndarfrágreiðing
10. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
11. Støðutakan um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli, smb. góðkenda roknskapin
12. Val av nevnd
13. Val av grannskoðara
14. Mál, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja til viðgerðar

Um m/s »Tróndur í Gøtu« er til fiskiskap tá aðalfundurin er settur til at verða, verður ásett til nýggjan fund, sum verður lýstur í Útvarpi Føroya.

**Nevndin**

# Ársaðalfundur
## hjá P/f Varðanum í Gøtu

verður hildin í hølum felagsins leygardagin tann 23. juni 2001 kl. 16.00.

Dagsskrá:
1. Val av fundarstjóra
2. Nevndarfrágreiðing
3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
4. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli smb. góðkenda roknskapin
5. Val av nevnd
6. Val av grannskoðara
7. Hækkan av partapeninginum
8. Lækkan av partapeninginum
9. Mál, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja til viðgerðar

Um m/s »Tróndur í Gøtu« er til fiskiskap, tá aðalfundurin er settur til at verða, verður ásett til nýggjan fund, sum verður lýstur í Útvarpi Føroya.

**Nevndin**

# Vaskifólk

Vaskarí & Reingering søkir eftir royndum dugnaligum fólki til reingerðaruppgávur í Tórshavn.

Vit hava brúk fyri tveimum fólkum til fastar vaktir (gjarna vinkonur) og trimum avloysarum til summarið 2001.

Væntast má at: Fólkið, ið brúkast skal, má vera álítandi og duga at arbeiða sjálvstøðugt og vera eldri enn 21 ár.

Er hetta nakað fyri teg, ring beinanvegin til Jóannes á tlf. 211312 ella Mary á 313224.

Vaskarí & Reingering

STARV sosialurin

# Fólk søkist

til Tíðindablaðið Sosialin, marknaðardeildin

Vit sóknast eftir einum fólki at taka sær av dagliga arbeiðinum við sølu av lýsingum og øðrum fyrifallandi uppgávum.
Herundir er ein uppgáva at verða við til at menna og reka Internet Sosialin.

Tú:
- Ert ágrytin
- Dugir væl at tosa í telefon
- Hevur lætt at tosa við fólk
- Hevur áhuga fyri telduarbeiði
- Ert før/ur fyri at arbeiða undir tíðartrýsti
- Hevur hugflog og dugir at festa tað á pappír
- Dugir væl føroyskt
- Kanst byrja skjótast gjørligt

Vit kunnu bjóða:
- eitt spennandi og mennandi starv, har tú gerst partur av eini vælvirkandi marknaðardeild
- Samskifti innan- og uttanlands við viðskiftafólk okkara
- Áhugaverdar og fjølbroyttar uppgávur

Umsóknarfreistin er 20. juni 2001.
Løn samb. avtalu.
Umsóknin skal saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
P.O. Box 76
110 Tórshavn
Att.: Marjun Dalsgaard

Tú ert vælkomin at ringja tel. 311820 at hoyra meira um starvið.
Spyr eftir Marjun ella send ein e-mail til:
marjun@sosialurin.fo

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Her starvast í dag uml. 25 fólk.

SMS søkir eftir

# húsi í Tórshavn

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434